# Asfalt skráin er avdúkað

Í dag og í gjár hevur Asfalt kunngjørt seinastu nøvnini á risastóra tónleikatiltakinum í Tórsgøtu, tað eru í dag fýra vikur til Føroya størsta tónleikatiltak, um vit tosa í bólkatali, verður sett í gond, og nú er fjølbroytta skráin tøk á heimasíðuni asfalt.fo

Tilsamans eru 61 nøvn á konsertunum í seks ymiskum spælistøðum í Tórsgøtu. Ímillum teir 13 bólkarnir, ið vórðu avdúkaðir í dag vóru fleiri kend nøvn. Bólkar sum Terji og Føstufressar, Eyðun Nolsøe, Tinganest, Hatespeech, Magni Christiansen, Rowan,Tvey av Kamarinum og Eyðun Jacobsen Band. Men eisini minnið kend nøvn sum studentaskúlabólkurin Crazy Miss Daisy, gamli jassbólkurin hjá Carsten Vogel og Kristian Blak, Fagrir Fuglar, BTer og Føroya Sving Ting. Harumframt er ein gamal kenningur upprisin undir nýggjum navnið. Eingin minnið enn Gulli Johansen, úr Human Caos og Eternal Healing, fer á pallin .

**nud**

# Javna-dagur í Miðlahúsinum

Leygardagin 6. mai er Javna-dagur í Miðlahúsinum í vágsbotni

Kl. 11.00 bjóðar Javni teimum við menningartarni á fund, har greitt verður frá ætlanini um at seta á stovn eitt serstakt felag fyri fólk við menningartarni. Endamálið við einum slíkum felag er at tey við menningartarni sjálvi skula kunna tala sín søk og ávirka, tá tað kemur til viðurskifti sum hava við tey at gera. Hetta felag kemur í øllum lutum at arbeiða tætt saman við Javna.

Kl. 15.00 verður árligi aðalfundurin hjá Javna. Umframt val av nevndarlimum, formanafrágreiðing, framløga av rokniskapi osfr, verður eisini greitt frá átakinum "Virkin og virðismikil", sum Javni skipar fyri í samband við 35 ára stovningardagin og sum m.a. umfatar eitt stórst lýsingarátak har 4 fólk við menningartarni taka lut.

Øll eru hjartaliga vælkomin at leggja leiðina framvið í Miðlahúsinum leygardagin 6. mai


norden




„Skuolfi"

**Samiskur gestaleikur í Norðurlandahúsinum 9. mai kl. 19.30**

**Týsdagur 9. mai kl. 19.30**
Atgongumerki kr. 100,-

Talan er um eina joiku-operu av Harriet Nordlund. Tað er sámiska leikarafelagið Beaivvás, ið kemur higar við leikinum. Leikurin er úrslitið av einum samstarvi millum Beaivvás Sámi Teáhter og Musikk i Finnmark.

Frásøgnin stavar frá norðurumráðnum, og er um ein mann, ið verður funnin í fjøllunum, og sum aldrin áður hevur havt samband við tann nýmótans vesturheimin.

**Fleiri upplýsingar fáast á www.nlh.fo ella við at ringja 351 351**

NORDENS HUS PÅ FÆRØERNE
NORÐURLANDAHÚSIÐ

Norðari Ringvegur • 100 Tórshavn • Tlf. 351 351 • Fax 351 350 • www.nlh.fo



**Solar Føroyar**

**Starvsfólk søkist**

Stavið umfatar sølu av el-lutum
Vit vanta at tú hevur royndir innan sølu og/ella tænastu, dentur verður lagdur á at tú dugir væl at samskifta og er fyrikomandi

Send umsókn til:

**solar Føroyar**

Brekkutún 2 · Hoyvík · Tel 35 79 33 · fax 31 78 90 · teldupost: finn@solar.fo



**Almanna- og heilsumálaráðið søkir løgfrøðingar**

## Okkara paragraffir eru turrisligar…




## …men tær hava stóran týdning fyri fólk

Lógir og reglur á almanna- og heilsuøkinum eru altíð á breddanum. Tí hesar lógir og reglur hava stóran og beinleiðis týdning fyri nógv fólk í okkara samfelag. Ein væl fyrireikað lóg gevur fólki eitt betri lív. Ein illa fyrireikað lóg ger tað øvuta.

Tí er tað ein stór avbjóðing at vera løgfrøðingur í Almanna- og heilsumálaráðnum.

Ynskir tú at hjálpa okkum við at menna um okkara lógarsmíð, og tú annars líkur treytirnar niðanfyri, so send okkum umsókn tína til starv sum fulltrúi í Almanna- og heilsumálaráðnum. Tað eru 2 størv leys at søkja.

Vit leita eftir umsøkjarum sum:
- Hava lokið prógv sum løgfrøðingar, ella eru um at vera liðugt útbúnir. Hevur tú aðra samfelagsfrøðisliga útbúgving, so eru vit eisini áhugaði í tíni umsókn.
- Duga væl at samstarva og arbeiða sjálvstøðugt.

Vit kunnu bjóða:
- Starv sum er sjálvstøðugt, áhugavert og mennandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum, sum skulu loysast í samstarvi við starvsfelagarnar í ráðnum.
- Avbjóðandi arbeiði, ið gevur góðar møguleikar fyri førleikamenning.

Lønar-og setanartreytir:
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið. Setanin fevnir um Almanna-og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umfrámt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð. Umsóknir við avriti av viðkomandi prógvum og skjølum skulu sendast til:

Almanna-og heilsumálaráðið
Eirargarður 2
FO 100 Tórshavn.

Og verða okkum í hendi í seinasta lagi:
**22. mai 2006 kl. 12.00**

Fyri at frætta nærri um størvini eru viðkomandi vælkomin at venda sær til Eyðun Mohr Hansen, deildarstjóra, á telefon 304050 ella á teldupostbústaðnum ahr@ahr.fo.

www.sansir.fo

**Almanna- og heilsumálaráðið, ið umsitur almannamál, heilsumál og bústaðarmál, veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Í løtuni starvast 32 fólk í ráðnum.**

**Vit draga eina línu** **Vit seta skynsemi í hásæti** **Vit vilja vita** **Vit bróta slóð**



**MIKLAGARÐUR**

# STARVSLÝSING

## HJALLURIN Í SMS

Søkt verður starvsfólki at standa fyri dagliga rakstrinum av hjallinum í Miklagarði. Tann, ið settur verður, má hava kunnleika til fisk sum ráváru og til føroyskar serrættir.

Viðkomandi verður settur inn í tingini eftir starvsbyrjan. Løn sambært avtalu.

**SEND UMSÓKNINA TIL:**

Miklagarður
att.: Jørgen Jørgensen
Postboks 1069
110 Tórshavn